# Kreppuskattur í Króatíu

Eins og flestu onnur lond er Kroatia meint rakt av altjóða figgjarkreppuni. Tí eru tiltøk neyðug, og í gjár legði stjórnin fram uppskot um at leggja trý prosent í kreppuskatti oman á allar lønir, sum eru oman fyri góðar 2.500 krónur um mánaðin. Stjórnin sigur, at verður uppskotið samtykt, fer tað at geva ríkiskassanum einar fýra milliardir krónur um árið. Stjórnin hevur havt uppskotið til hoyringar hjá fakfeløgunum, og sambært fjølmiðlunum fekk tað jaliga móttøku. Eitt annað krepputiltak hjá stjórnini er at hækka rentuskattin. Tey, sum eru ímóti uppskotunum, siga, at skattahækkingarnar fara at elva til meiri skattasvik.



# Vespur lupu á danskt húski

Eini donsk hjún og børnini, sum eru tvey í tali, fingu ein rættiligan hvøkk, tá tey fyrr í vikuni vóru fyri einum ógvusligum vespuálopi á Møn. Fjølmiðlarnir skriva, at tey fýra høvdu sitið á einum teppi. Tá tey tóku teppi upp, vísti tað seg, at eitt vespureiður var undir teppinum, og vespurnar lupu alt fyri eitt á og stungu øll fýra fleiri ferðir. Tað eydnaðist teimum at sleppa í bilin, men á vegnum til sjúkrahúsið svímaðu bæði foreldrini, samstundis sum børnini fóru at spýggja. Tað eydnaðist mammuni at boða alarmsentralinum frá, áðrenn hon svímaði, og øll fýra komu undir læknahond. Tað vísti seg, at dótturin Emilie var stungin ikki færri enn 45 ferðir, og sambært fjølmiðlunum torir hon ikki út fyri dyr nú. Ikki so løgið.

# Nýggjur vegur um Stóruá



*Nakað er eftir at gera, til vegurin er liðugur*
Mynd: Árni Joensen

**Í gjár koyrdu teir fyrstu bilarnir eftir tí nýggja vegnum tvørtur úr Stóruá við Gjógv**

FERÐSLA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Nú verður tað ikki leingi, til ferðafólk, sum ætla sær á Gjáargarð ella á gjónna við Gjógv, sleppa frá at koyra ígjøgnum hygdina. Síðani síðst í juni hava menn hjá Sunda kommunu arbeitt við at gera brúgv tvørtur um Stóruá og vegir báðumegin, og í gjár var koyrandi tvørturum.

Gjógv er eitt sera væl umtókt ferðamál um summarið, og tí koma nógvir bilar og bussar til bygdina at kalla hvønn dag hesa tíðina. Eitt nú vóru ikki færri enn tólv bussar við umleið 600 ferðafólkum við Gjógv í gjár. Tann stóra ferðslan ger, at tað kann ofta vera trongligt í sjálvari bygdini, men tað nýggja sambandið skuldi bøtt um hetta.

Tann nýggja brúgvin er úr betongelementum, sum eru gjørd í Danmark. Sjálvt arbeiðið hava menn hjá Sunda kommunu gjørt, og kostnaðurin liggur um 400.000 krónur.

# Listavirðisløn Miðlahúsins latin á tjóðardegnum

**Tórshavnar Kommuna stuðlar virðislønini hesaferð**

Fyri aðru ferð verður Listavirðisløn Miðlahúsins latin ólavsøkudag. Hon verður latin einum ella fleiri skapandi ella útinnandi listafólkum ella bólkum, sum hava stóran týdning fyri føroyingar og fyri føroyskan samleika. Hetta seinna verður undirstrikað við, at virðislønin verður handað tjóðardagin, ólavsøkudag kl. 14 eftir tingsetan og við at handanin fer fram við standmyndina av Nólsoyar Páll í Vágsbotni, ið hevur so stóran ímyndaligan týdning fyri okkum føroyingar. Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltakið. Tórshavnar Kommuna, sum hátíðarheldur 100 ár sum kommuna, stuðlar tiltakinum.



*Í fjør var virðislønin latin Stanley Samuelsen og Hanus G. Johansen*

# Gamla Havnin í Nýggjum Búna

**Soleiðis ljóðar yvirskriftin á stórari Big Band konsert sum verður á parkeringsøkinum í Tórsgøtu sunnudagin 26 juli**

TÓNLEIKUR

*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*



*Eirikur í Skála og Ólavur Olsen eru tveir av teimum, sum skipa fryi stóru Big Band konsertini í Tórsgøtu*

Tað er í samband við 100 ára haldið hjá Tórshavnar Kommunu at Tórshavnar Stórband kemur at framføra kend havnarløg í nýggjum Big Band búna.

Tórshavnar Kommuna hevur tíbiðið Magnus Johannessen um at samskipa og útseta allan tónleikin sum verður framførdur á konsertini. Millum annað koma vit at hoyra løg so sum Eitt sunnukvøld í Plantasjuni, Leygarkvøld í Havn, Til Havnar vit fara og fleiri.

Eisini verða tvær frumframførslur har Martin Joensen hevur skrivað orð til tvey av løgunum hjá Magnusi.

Fleiri sangarar koma at luttaka á konsertini og eru teir James Olsen, Anna Nygaard, Finnur Jensen og Sølva Ford.

Til at fáa góðskuna á eitt enn hægri støði, hevur Tórshavnar Stórband fingið hjálp frá tveimum saxofonspælarum úr Íslandi og einum trombon spælara úr Danmark.

Frásøgufólk verður Robert Mc Birnie og samskiparar av øllum tiltakinum eru Ólavur Olsen og Eirikur Skála, og tiltakið er gjørt í samstarvi við 100 ára haldið hjá Tórshavnar Kommunu.